## DAGSINS MEINING

# Føroyar í brennideplinum

Føroyar koma rættiliga í brennidepilin í dag og komandi dagarnar. Ongantíð áður hava so nógv fjølmiðlafólk úr Danmark – og øðrum londum við – skrivað, sagt og avmyndað eina vitjan hjá danska kongshúsinum sum hesuferð. Tær stóru donsku sjónvarsrásirnar eru her á landi eins og tey stóru donsku dagbløðini.

Eingin ivast í, at tað hevur týdning, at Føroyar koma í tilvitanina hjá dønum og øðrum á evropeiska meginlandinum á ein jaligan hátt. Tað hevur týdning fyri ferðavinnuna, vinnuna sum heild og óivað eisini mentanarliga. Flestu lond brúka nógvan pening at marknaðarføra seg, men henda marknaðarføringin er so at siga ókeypis.

Tað tykist, sum drotninga- og krúnprinsavitjanin er væl fyri skipað, hóast skráin er tætt pakkað, og kanska kundi verið meira fjølbroytt. Alt er lagt til rættis - í detaljum og minuttum – so nú er bara at vóna, at veðrið fer at vísa oggjarnar – bygdir og náttúru – í sínum fagrasta skrúð.

Nógv er stákað upp, pyntað og málað. Onkur hevur kanska hug at illneitast, at so nógv verður gjørt burtur úr eini slíkari vitjan. Men líka mikið, um fólk hella tann republikanska vegin ella eru royal, so hevur ein slík vitjan nógv størri týdning, enn vit geva okkum fær um.

Tað hevur týdning at fáa nógv gjørt, nú summarið og ferðatíðin er fyri framman. Nógv skuldi kanska gerast, men er framskundað. Okkurt annað hevði kanska ikki verið gjørt, men nú var so eitt høvi at fáa tað gjørt. Harafturat er ein slík vitjan ein stór avbjóðing hjá øllum teimum sum fyrreika vitjanina. Tað veri seg landsmyndugleikar, kommunur, stovnar, søvn o.s.fr.

Eisini er vitjanin ein stór avbjóðing hjá teimum, sum skuldu fáa ymisk arbeiði frá hondini so væl sum gjørligt, tað veri seg handverkarar og arbeiðsmenn. Eins og vitjanin er ein spennandi avbjóðing hjá teimum, sum skulu framføra sang, tónleik, gera mat, pynta og annars greiða frá inni og úti.

V.ø.o. er vitjanin annað enn bara at vísa drotninga- og krúnprinsahjúnunum gott føroyskt gestablídni hesar fýra dagarnar. Vitjanin er sanniliga ein mennandi avbjóðing í at fyrireika og leggja størri tiltøk til rættis, soleiðis at alt fellur upp á pláss uttan størri mistøk.

Tað er einki at taka seg aftur í, at Margreta drotning er eitt gott umboð fyri danska ríkið. Tað er neyvan nøkur loyna, at flestu føroyingar hella til samfelagsskipanina við kongshúsi, soleingi vit eru partur í danska ríkinum. Tí fylgja óivað nógv væl við tí, sum bløðini skriva og vísa av myndum, og tí, sum er at hoyra og síggja í útvarpi og sjónvarpi.

At enda ynskja vit Margretu drotning og hennara fylgi vælkomnum og vóna at tey, saman við føroysku umboðunum, fáa nakrar góðar dagar her á landi.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Landsins størsta tíðindablað?

**Hjalgrim Samuelsen**
*stjóri, Dimmalætting*



**Kann ein vænta, at Sosialurin hevur áhuga at siga allan tann kenda sannleikan?**

Sosialurin hevur eina grein í síðsta leygardagsblaðnum,um at blaðið sambært Gallup-kanningum nú er mest lisna tíðindablað í landinum, bert yvirgingin av lýsingarblaðnum Vikublaðið.

Kanningin, sipað verður til í greinini, er ein útgáva, ið Gallup gav út 27. mai í ár, har teir taka saman um allar lesarakanningarnar, ið gjørdar eru, síðani Gallup byrjaði at gera kanningar í 2002. Millum tølini í hesum verki er eisini ein samanteljing av kanningunum fyri tíðarskeiðið mai 2004 til mars í ár, og eru tað hesi tøl, ið sipað verður til í greinini.

### Gongdin síðani

Men tíðin stendur sum kunnugt ikki í stað, og er sera nógv hent á blaðmarknaðinum seinastu tíðina, og sum greinaskrivarin - í loyaliteti við sín arbeiðsgevara - ikki tekur hædd fyri.

M.a. hava vit á Dimmalætting framt broytingar viðvíkjandi bæði formatinum og útberingini, samstundis sum at eitt nýtt lýsingablað hevur sæð dagsins ljós. Kappingin í blaðheiminum er tí harnað nógv, og síggjast tí broytingar í nýggjastu lesaratølunum hjá Gallup.

Í kanningini fyri mai í ár, sum Gallup kunngjørdi 9. juni, eru tað 55% av føroyingunum yvir 15 ár, sum siga seg hava lisið Sosialin, meðan tað eru 56%, sum siga seg hava lisið Dimmalætting. Tað er sostatt ikki í løtuni grundarlag fyri at siga, at Sosialurin er størsta tíðindablað í landinum!

### Er blaðið álítandi?

Tá havt verður í huga, at Gallup hevur sent lesaratølini fyri mai út til øll, sum fingu stóru kanningina, ið víst verður til í greinini, er tað sera átaluvert, at blaðið til egnan fyrimun heldur upplýsingum aftur fyri sínum lesarnum. Hetta tænir hvørki trúvirðinum hjá blaðnum ella tí journalistiska fakinum sum heild.

Um krøv um objektivitet vórðu sett til tað journalistiska arbeiðið á blaðnum - eins og tað formliga hevur verið á Dimmalætting nú í fleiri ár - hevði greinaskrivarin og blaðleiðslan vitað, at tað eisini er umráðandi at vísa ans, tá egin viðurskifti verða viðgjørd í blaðnum.

# Landsins størsta tíðindablað

**Jan Müller, stjóri**



Sosialurin hevur í leygardagsblaðnum grein um eina kanning hjá Gallup Føroyar, sum er komin rættiliga upp á tvørs á Dimmalætting. Stjórin á Dimmalætting leggur í eini óstortligari viðmerking í dag Sosialin undir at bera skeiv tíðindi.

### Tíðindini eru ikki skeiv.

Greinin í Sosialinum byggir á eina kanning, sum Gallup Føroyar sendi út fyri einari góðari viku síðani, og nýggjari tøl enn tey kendi Sosialurin einki til fríggjadagin!

Gallup ger næstan hvønn mánað eina lesarakanning av føroysku bløðunum, og í kanningini, sum Sosialurin hevur fingið, er ein samanteljing av kanningunum hjá Gallup frá 1. mai í 2004 og eitt lítið ár fram. Hendan samanteljing vísir, at Sosialurin hevur munandi fleiri lesarar enn Dimmalætting í sama tíðarskeiði.

### Røtt

Síðani hevur Gallup gjørt enn eina lesarkanning í mai mánaði, sum Sosialurin einki visti um, tá ið greinin var skrivað fríggjadagin. Hon skal vísa, at Dimma er eitt prosentstig frammanfyri Sosialin í lesaratølum, eftir at Dimma er farið at geva føroyingum ókeypis bløð hvørt týskvøld.

Lesaratølini broytast hvønn mánað, og onkran einstakan mánað í samateljingini frá mai í fjør og til mars í ár, er Dimma frammanfyri Sosialin, men talt saman yvir eitt longri tíðarskeið var Sosialurin fimm prosentstig frammanfyri Dimmu!

Tað var søgan í Sosialinum leygardagin, og hon er hvørki misvísandi ella skeiv.

At Dimma nú í eini trongdari støðu roynir at fáa føroyingar at lesa blaðið við at lata tað ókeypis eina ferð um vikuna, ger ivaleyst, at fleiri fólk síggja Dimmu týskvøld, men spurningurin er, um Dimmalætting týskvøld kann roknast sum eitt tíðindablað ella kann samanberast við eitt ókeypis lýsingablað.

### Sosialurin á veg fram

Stjórin á Dimmalætting roynir í sínari viðmerking av órøttum at niðurgera journlistikkin á Sosialinum, og tað má ivaleyst verða meira eitt úttrykk fyri frusteratiónir á Dimmu. Sosialurin tekur sín tíðindaflutning í størsta álvara, og øll tøl seinastu mongu árini vísa, at Sosialurin er á veg fram, meðan Dimma hevur gingið aftur.

Og nú vit eru við tøl, so kundi tað verið áhugavert at fingið upplýst frá stjóranum á Dimmalætting, hvussu stórt veruliga upplagið hjá Dimmalætting er gerandisdagar (undantikið týskvøld, tá øll skulu hava blaðið ókeypis), og um Dimmalætting framvegis hevur størri upplag enn Sosialurin.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.